VIÐMERKINGAR

Um bókina »Horvin føroyingur«

Karla Gaard

Severin Strømsten hevur ongantíð verið horvin, øll hava vitað hvar hann var. So tað er líka lítið í tí, sum í so mongum øðrum, sum er at lesa í hesum ótespiliga lesnaði. Tað mátti sagt eitt sindur um Severin sjálvan, at hann skal hava verið noyddur at flýggja til Brasilia undan pápa sínum 31 ára gamal. Og so at varta upp við lygnum og óndskapi, har hann skírir abba fyri at vera horbukk, drankara og húsbøðil, hvat hvørki vit, sum búðu har, ella oyrarfólk annars kenna nakað til. Abbi doyði í 1977, so í 1978 fekk Severin tað sama í arv sum hini systkini hjá honum, 35.000 krónur. Tá var Severin heldur ikki burtur.

Teir tríggir menninir, sum fóru til Brasilia í heyst at leita eftir Severin Strømsten, mundu hava eina lætta uppgávu, teir høvdu bæði adressu og telefonnummar við heimanífrá.

So kemur Gesturin í Sjónvarp Føroya, og tað er Grækaris Magnussen, sum sigur frá ferðini og sínum samrøðum við Severin. Millum annað skuldi Severin hava nevnt, at hann var bittur inn á systur sína, sum var deyð, at hon hevði livað eitt óvanligt lív. So sigur Grækaris Magnussen, at tað er dóttir hennara, sum er í øðini um bókina. Ja, Gud havi lov, at eg eri dóttir hennara og ikki dóttir Grækaris ella Severin.

Eg skal gera Grækaris púra greitt, at mamma okkara skal hava frið at liggja í sínari grøv, bæði fyri honum og brøðrum hennara. At Severin má flýggja 31 ára gamal í februar 1947 má vera nakað, hann sigur fyri at vaska hendur sínar.

Mamma okkara doyði í september 1947, og tá fekk abbi foreldrarættin yvir okkum, sum tá vóru 4 - 7 og 10 ára gomul, og vuksu vit trý systkin upp har hjá ommu og abba, og tað sluppu ikki øll í okkara støðu, so tað kunnu vit takka ommu og abba fyri. Vit høvdu ongan annan at halla okkum afturat, og vóru vit har til vit kundu klára okkum sjálv, men vit fóru væl áðrenn vit vóru 31 ár, og alt annað, sum Grækaris skrivar um oyrarfólk, er ókent fyri øll tey oyrarfólk, eg kenni, sum eg havi tosað við.

Ja, víst hevði abbi feilir sum vit øll onnur, men at hansara egnu synir vilja vera við til at hunddálka minnið um foreldur síni, tað er langt úti.

Lukkuligur er hann, sum livir eitt langt lív, og eingin plettur er á.

Ungdómur í Klaksvík

Jórun Høgnesen
formaður í Mentunnarnevnd Klaksvíkar Býráðs

Mikukvøldið 5. desember bjóðaði Klaksvíkar Býráð foreldrum til fundar um ungdómsviðurskifti í býnum. Foreldrini tóku væl undir við ætlanum Býráðsins, og Býráðið fer í næstum at skipa fyri fundi, har ungdómurin sleppur at siga sína hugsan.

Lat meg byrja við at sláa fast, at vit eiga ein deiligan ungdóm í Klaksvík, og at tað unga fólkið hevur uppiborið eina góða og trygga ungdómstíð. Hetta hevur stóran týdning fyri samfelag okkara, tí einaferð verður tað teirra ábyrgd at føra alt virksemið í samfelagnum víðari, og tí ræður um at brynja og stuðla tey so væl sum gjørligt.

Ungdómspolitikkur orðast

Seinastu árini hevur ofta verið at hoyrt, at ungdómurin í Klaksvík saknar eitt stað at hittast í, sum er teirra, og at onki er at fara til. Tey keða seg og fara út at vála uttan mið og mál. Um tað veruliga er so galið kann helst diskuterast, men vit sleppa ikki uttan um, at vit ongan orðaðan ungdómspolitikk hava. Ein slík orðing finst ikki í Føroym í dag. Mín hugsan er, at Klaksvíkar Kommuna skal orða ein ungdómspolitikk, sum skal verða skræddaraseymaður til viðurskiftini í Klaksvík. Tað er neyðugt við eini tílíkari orðing, sum greitt sigur hvat vit vilja og hvørji mál vit skulu seta okkum, tí einki má gerast tilvildarligt.

Fundur við ungdómin

Foreldrafundurin um ungdómsviðurskifti, sum var í Býráðshøllini var góður og viðkomandi, og prógvaði, at foreldrini taka undir við hesi ætlan. Eisini luttók Carl August Arge frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum á fundinum, tí vit vilja gera púra greitt, at ætlaða ungdómshúsið skal vera rúsfrítt. Fyri at hetta arbeiði skal eydnast so væl sum gjørligt, fer kommunan at skipa fyri einum fundi afturat, og tá verða tað tey ungu, sum skulu hoyrast, tí tað er av størsta týdningi at fyrireika hesa verkætlan væl, um hon skal eydnast væl. Tað er umráðandi, at allir partar siga sína hugsan. Nær og hvar fundurin verður, verður lýst seinni.

Fjøltáttað tilboð til ungdómin

Í Klaksvík eru fleiri feløg, sum beinleiðis venda sær til børn og ung, og gera øll hesi eitt stórt arbeiði, sum hevur stóran týdning fyri trivnaðin í býnum. Hetta hevur stórt virði fyri okkum øll, og eiga tit stóra tøkk uppiborna fyri tað arbeiðið tit gera. Mín vón er, at øll hesi tilboð, saman við tí ungdómshúsi, ið kommunan fer at taka stig til, fer at gera Klaksvík til ein bý, har ungdómurin trívist.

At enda fari eg at nýta høvið at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

Í Býin

EYÐUN & TERJI
á Kambsdali leygarkvøldið 22. des.

Ársins jóladansur við Eyðun og Terja verður á Kambsdali leygarkvøldið 22. desember.
Ja nú hava øll fingið jólafrí - lagt er upp til eitt gott dansikvøld
Møguleiki verður at keypa toast og sodavatn
Strálan

Hafnia Lounge
Frá nú av fram til jóla hava vit m.a.
Gløgg kr. 30,-
Eplaskivur kr. 15,-
Stór vafla við róma og súltutoy kr. 15,-
Kaffi við dagsins køku kr. 38,-
Størri úrval á menukorti
Opið frá kl. 14.00
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33 - Fax 31 52 50

Casablanca Ristorante
Hugnalig nýggj Italiensk matstova
Vel millum 30 fjølbroyttar:
Forverðar, suppur, pasta, pizza, fiskaverðar, kjøtverðar, barnamenu og dessertir
Opið er frá kl. 12.00
Borðbílegging á tlf 31 96 96
Casablanca Ristorante

fk Matseðilin
Hósdagin 20. des.: Karbonadir
Fríggjadagin 21. des.: Nakkasteik
Leygardagin 22. des.: Enskan búff
Hósdagin 27. des.: Fiskafrikadellur
Fríggjadagin 28. des.: Hamburgarrygg
Leygardagin 29. des.: Kalkunbringa
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Shanghai
Bíleggið borð á telefon 223000 ella 457680

BAROK

Í Býin

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

Í kvøld:
Unn Patursson Band
Nýtt á Café í Føroyum:
Sirupp at koyra í kaffi / cappucino / espresso
Ymiskir smakkir - t.d. karamell
Í desember:
Gløgg & holukøkur kr. 40,-
livandi tónleikur
Café Natúr
Tlf. 31 26 25

HESA VIKUNA
Hóskvøldið DJ Annfinn Gaard
Fríggjakvøldið ladies night DJ Annfinn Gaard
Leygarkvøldið DJ Eyfinn Drewsen
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.–frí. 17.00–24.00 og leyg.–sun. 14.00–24.00
Club 20 Café
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós 69,–
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

fríggjakvøldið eyðun & terji unplugged + dj ottar
leygarkvøldið rúni og høgni eru DJ
2. jólakvøld james olsen band + DJ
PLATFORM discoteque

NÁTT-BUSSURIN hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir: Tlf. 286254

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
EXIT
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 Tlf. 31 15 65

DANSUR Í KVÍVÍK
Góður dansur verður í Kvívík 2. jólakvøld, Arne Emil spælur
GLÆMAN

Í Býin - hvønn hósdag

Nýggjárskonsertin í Ítróttarhøllini á Hálsi 2001
CHASE
ALL THAT RAIN
EYÐUN & TERJI
Leygarkvøldið 29. des. frá kl. 23.00-03.45
Atgongumerki fáast í forsølu á Statoilstøðum kring alt landið og í 3'arinum og Kunningarstovuni í Tórshavn
Kostnaður 130,-
FARODANE City
KYNDIL
HANDILIN
ATLANTIC AIRWAYS
Restorffs
FØROYA SPARIKASSI